## Ruth um móta

- Eg royni at fylgja við. Eg havi stóran áhuga fyri móta, men tað kostar nógv at fylgja við mótanum. Men eg geri mítt besta



## Ruth um kvinnur í politikki

- Eg eri als ikki áhugað í politikki. Tað tykist, sum at politiskt arbeiði er meira fyri mannfólk. Men eg haldi kortini, at tað er gott, at okkurt konufólk er á Tingi. Men politikkur og eg hoyra ikki saman.

# Ruth Thomassen:

# Flogbóltsspælari droymir u

**Ruth Thomassen úr Miðvági spælir flogbólt við Drátti. Hon gleðir seg til steypafinaluna í vikuskiftinum, sum er størsta ítróttarliga avbjóðingin hjá henni higartil. Ruth sær seg sjálva sum eitt sindur rokaliga, tí at hon hevur altíð dámt at gera ítrótt, og so ætlar hon sær at vera løgreglukvinna**



### Ítróttarprofilurin




Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo


Í vikuskiftinum verða steypafinalurnar í flogbólti spældar. Hjá kvinnunum verða tað Dráttur og KÍF, sum hittast.

Ruth Thomssen er yngsti leikari hjá Drátti. Hon er einans 17 ár. Hetta er seinna árið, hon spælir í meistaradeildini.

Ruth hevur leikt við ungdómslandsliðum, bæði U17 og U19, og hon klárar seg væl í meistaradeildini. Tað er lítil ivi um, at hon kann gerast gerast heilt góð, um hon heldur fram at spæla flogbólt.

Ruth gleðir seg eisini sera nógv til steypafinaluna leygardagin.

- Steypafinalan er tann størsti dysturin á árinum. Tað er ein dreymur at sleppa at spæla steypafinalu, sigur hon.

Hon metir, at KÍF er eitt torført mótstøðulið.

- Tað er torført at siga, hvør vinnur. Eg vænti, at tað verður ein sera javnur og strævin dystur. KÍF eru sera væl koyrandi fyri tíðina, so vit mugu spæla upp til okkara besta, sigur Ruth.

### Spælir flogbólt og fótbólt

Ruth hevur sjálv altíð havt áhuga fyri ítrótti. Hetta hóast at eingin annar í familjuni spælir nakað serligt ítrótt.

- Eg byrjaði at spæla flogbólt sum 10 ára gomul. Eg havi altíð tímað væl allan ítrótt. Eg spæli eisini fótbólt, tá ið tað liggur fyri. Eg byrjaði eisini at spæla hondbólt sum lítil, men eg gavst skjótt við tí.

Ítrótturin tekur sostatt nógva tíð hjá Ruth. Um veturin spælir hon flogbólt, og um summarið spælir hon fótbólt. Umframt hetta, brúkar hon eisini stóran part av sínari frítíð í kristiligum arbeiði.

- Eg eri nógv í missiónhúsinum í Miðvági. Har er nógv virksemi, og eg syngi ofta fyri til ungdómsmøtir. Eg plagi at fylgjast við vinunum á møti, og vit eru á ungdómsmøti í Sørvági fríggjakvøld, í Miðvági leygarkvøld og í Sandavági sunnukvøld, sigur Ruth.

### Vil vera løgreglukvinna

Ruth hevur ikki nakað fast arbeiði